# Her havið og himmalin hittast

Hóast tíðin við norsku vitunum í mangar mátar er farin orsakað av tøkniligu menningini, er tíðin als ikki farin frá nýggjum hugskotum – sum t.d. at bjóða fólki uppihald á hesum staði.

## VITI

*Ein viti er ikki longu bert ein viti. Nú kann ein búgva her, samstundis sum ein kann fara á alskyns listaframsýningar. Alt er gjørt fyri at tey vitjandi skulu fáa eitt øðrvísi, spennandi og gott uppihald á vitanum í Ryvarden*





At vitja Ryvarden Kulturfyr uttan at merkja náttúruna og mátt hennara á likam og sál, ber snøgt sagt ikki til.

Tá stormarnir herja um heystið, og tú nærum ikki kanst ganga upprættur. Ella tað er blikalogn og ikki ein ond rørist, fær ein av sonnum inntrykkini inn undir húðina, har tey verða verandi.

Vitin liggur á einum nesi, ið strekkir seg út í hav, har ein á ein serstakan hátt kann fara aftur í tíðina fyri at merkja, hvussu fólk hava búleikast her gjøgnum tíðirnar.

Á hesum vitanum, og fleiri øðrum framvið norsku strondini, ber til at liggja nátt, skipa fyri fundum og skeiðum ella bara hugna sær saman við familjuni ella vinfólki eitt vikuskifti.

Her á Ryvarden Kulturfyr er pláss fyri 8-10 fólkum, ið kunnu sova í fimm rúmum í bygninginum, ið varð dagført í 2007 og tí hevur góðan standard.

Ein teirra, sum hevur roynt hetta serstaka ferðatilboðið sigur soleiðis um staðið:

"Ein ótrúligt samdøgur á Ryvarden er av. Bústaðurin hjá vitapassaranum gav rætta karmin fyri ein góðan føðingardag, saman við vinum mínum. Ljósið .... skiftandi veðrið .... innrætting av húsinum og góða plássið .... kópurin sum veiddi .... stemningurin við ljósinum .... tað má eg bara viðmæla!"

Í vitanum er somuleiðis møguleiki at vitja framsýningar. Í hesum døgum og fram til 26. juni hava tær báðar listakvinnurnar Lise Birkeland og Trine Sundt framsýning av grafikki, skulpturum og glasi.

Ryvarden Kulturfyr, ið liggur miðskeiðis millum Bergen og Stavanger hevur egna heimasíðu, har meiri kann lesast um staðið – www.ryvarden.no

